NES KOMMUNA

650 Toftir · www.nes.fo · nes@nes.fo

## Barnagarðurin á Svangaskarði, Toftir søkir eftir 2 námsfrøðingum

**Til Barnagarðin verður søkt eftir:**

- 1 námsfrøðingi at arbeiða 30 tímar um vikuna at seta frá 01.03.2009
- 1 námsfrøðingi at arbeiða 30 tímar um vikuna at seta frá 01.04.2009

Barnagarðurin hevur 3 stovur, Sóldøgg, Sólareyga og Sólarglottin.

Í barnagarðinum eru 54 børn.

Barnagarðurin liggur við stadionøkið á Svangaskarði, tætt við náttúruna og við nógvum møguleikum at vera úti.

**Vit ynskja at umsøkjarin:**

- Dugir at seta seg inn í støðuna hjá tí einstaka barninum
- Hevur hug og áræði at skapa ein fjølbroyttan og tryggan dag saman við børnunum
- Hevur góð samstarvsevnir og kann taka ábyrgd
- Er við til at menna tað pedagogiska arbeiðið

Lønin er sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið í skala 11-18.

Um eingin námsfrøðingur søkir, verða hjálparfólk sett tíðaravmarkað í starvið.

Meira fæst at vita um størvini við at venda sær til leiðarin í Barnagarðinum á tlf 448760/565021

**Umsóknir**
saman við prógvum og møguligum viðmælum skulu verða Nes kommunu í hendi í seinasta lagi 08.02.2009.

**NES KOMMUNA**
**650 Toftir**
**www.nes.fo**
**nes@nes.fo**

---

# ZARTEC.NET
**Timburarbeiði**

---

# Umboðsmannaval

Sambært § 28 í høvuðssamtyktini verður lýst til umboðsmannaval leygardagin 21. februar 2009 í Vestmanna, Kvívíkar og Kollafjarðar umdømi.

Uppskot til umboð – tvey fyri hvørt umdømi – skulu skrivliga vera sjúkrakassanum í hendi í seinasta lagi 7. februar 2009.

**Sjúkrakassi Vestmanna Læknadømis á Miðgerði 19 · 410 Kollafjørður**

---

Heilsuskúli Føroya

**Heilsuskúli Føroya** søkir eftir sjúkrasystur at undirvísa 30 tímar um vikuna, at byrja 1. mars 2009 ella eftir avtalu.

Starvið umfatar undirvísing av heilsuhjálpara og heilsurøktaranæmingum, fyrireiking og tilrættisleggjan í samband við undirvísing. Harumframt samábyrgd av at gera útbúgvingar- og undirvísingarætlanir, at hava próvtøkur og lestrarvegleiðing.

Fyrimunur er um tú hevur námsfrøðiliga ella aðra eftirútbúgving, skeið e.l. og arbeiðsroyndir innan heilsuøkið.

Løn sambært sáttmála millum Felagið Føroyskir Sjúkrarøktarfrøðingar og Fíggjarmálaráðið.

Fleiri upplýsingar kunnu fáast vi at venda sær til deildarleiðaran á tlf. 36 38 50.

Umsóknarfreistin er 29.01.09 og umsóknir skulu sendast til:

Heilsuskúla Føroya,
Kongabrekkan 14,
800 Tvøroyri.
Att.: Jórun Petersen, deildarleiðari.

**HEILSUSKÚlI FØROYA**
Kongabrekkan 14 · FO-800 Tvøroyri · Faroe Islands
Tel 363850 · Fax 372950
www.heilsuskulin.fo · heilsuskulin@skulin.fo

---

# Kunningarfundur
## um ES-skipanina á útlendingaøkinum

Útlendingastovan skipar fyri almennum fundi í Norðurlandahúsinum týsdagin 20. januar, har starvsfólk frá danska Udlændingeservice greiða frá ES-skipanini og hvussu hon virkar.

Kunningin er serliga ætlað teimum arbeiðsgevarum, fakfeløgum og myndugleikum, ið hava við arbeiðsmegi úr ES at gera, men tiltakið er alment og tilmelding er ikki neyðug.

Fundurin verður í Skálanum í nýggju Athøllini í Norðurlandahúsinum frá kl. 9 til 12.

**Útlendingastovan**
Niels Finsensgøta 10, 3. hæð
Tel. 357979 · Postboks 220
100 Tórshavn

---

# Skrivstovuhølir til leigu

Góð og ljós skrivstovuhølir til leigu á Hjalla.

Atgongd til køk við øllum vanligum hentleikum og WC við bað.

**Tel. 21 73 00**

---

TVØROYRAR KOMMUNA

## Pedagogur til Frítíðarskúlan í Trongisvági

Søkt verður eftir pedagogi til Frítíðarskúlan í Trongisvági at arbeiða 25 tímar um vikuna.

Starvið verður sett 23.02.09 ella eftir nærri avtalu.

**Stovnslýsing:**
Frítíðarskúlin er normeraður til 40 børn í 1. 2 og 3. flokki. Hildið verður til í høli hjá Trongisvágs Skúla.

**Vit ynskja at tú:**

- hevur góð samstarvsevnir og kann arbeiða sjálvstøðugt.
- hevur hug at skapa ein fjølbroyttan og tryggan gerandisdag fyri børnunum.
- vísir virðing fyri børnum, foreldrum og starvsfelagum.
- ert nærløgd/lagdur og vísir umsorgan.
- vísir áhuga og ynskir at mennast í arbeiðinum.
- ert opin fyri broytingum

**Lønarviðurskifti:**
Løn sambært sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið.

Um pedagogur ikki fæst til starvið, verður hjálparfólk sett tíðaravmarkað ístaðin.

Meiri fæst at vita um starvið við at venda sær til Siri Mortensen, leiðara, á tlf. 372750 ella 225894.

**Umsókn:**
Saman við upplýsingum um útbúgving, royndum og møguligum viðmælum skulu verða Frítíðarskúlanum, FO-826 Trongisvágur í hendi í seinasta lagið 06.02.09.

---

FØROYA LANDFÚTI
POLITIMEISTARIN
Smyrilsvegur 20 · Postboks 3018
FO-110 Tórshavn · Tlf. 35 14 48

Frá mánadegnum 26. januar 2009 er Fútaskrivstovan flutt frá Smyrilsvegi 20 í Tórshavn.

Allar kundaavgreiðslur hjá politinum í Tórshavn, verða frá mánadegnum 26. januar 2009 á politistøðini, J. Broncksgøtu 17 í Tórshavn.

Avgreiðslutíðin er mánadag til og við fríggjadag frá kl.10.00 – kl.15.00.

Eftir kl. 15.00 verður avgreiðslan stongd.

Um borgari hevur átrokandi ørindi til politiið í Tórshavn uttanfyri vanliga avgreiðslutíð, ber til sum higartil at møta persónliga á politistøðini. Ein kann sjálvandi altíð ringja til politiið á tlf. nr. 351448, sum svarar alt døgnið.

**FØROYA LANDFÚTI**
Tórshavn, tann 15. januar 2009

Karen Marie Olesen